# Tórshavnar Býráð er aftur farið út um mark

**Reglarnar, sum Tórshavnar Býráð hevur sett í gildi fyri starvsfólkið, eru brot á ásettu mannagongdirnar. Kanska er enntá talan um sjálva starvsmannalógina, siga sakførarar**

STARVSFÓLKAPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tórshavnar Býráð er aftur komið í lógarinnar klemmu: Hesuferð er tað ikki byggisamtyktin, sum spøkir, men starvsfólkið í býráðnum. Býráðið hevur ikki rætt til at taki gomul rættindi frá starvsfólkinum, uttan at samráðast um tað, sigur sakførarar*

Tórshavnar Býráð hevur aftur stungið hondina í eitt vespureiður.

Tað gjørdi býráðið hóskvøldið, tá ið tað samtykti reglar fyri, hvørjki privat ørindi, starvsfólki hjá býráðnum kunnu gera í arbeiðstíðini.

Í stuttum siga hesar reglarnar, at starvsfólk skulu dragast í løn, tá ið tey fara privat ørindi í arbeiðstíðini, eisini tá ið tey fara til lækna og tannlækna.

Tey sleppa eisini bara at fylgja sínum næstringum til gravar, uttan at verða drigin í løn.

Men hetta hevur býráðið ikki heimild til at gera, siga tveir sakførarar, vit hava tosað við.

Báðir teirra gera tó vart við, at teir kenna bara málið úr fjølmiðlunum og hvørgin teirra hevur sostatt sett seg inn í málið til fulnar.

Men í eitt áramál hevur tað verið siðvenja í Tórshavnar Býráði, at starvsfólkini eru sloppin at fara til lækna ella tannlækna, og at fylgja líki í abreiðstíðini, uttan at verða drigin í løn.

– Eina slíka siðvenju hevur Tórshavnar Býráð ikki loyvi at broyta av sínum eintingum, siga bæði Eyðfinnur Jacobsen og Páll Nielsen, sakførarar.

– Eftir øllum at døma er tað í hesum føri talan um at taka nøkur rættindi frá starvsfólkunum og tað hevur býráðið ikki loyvi til, sigur Eyðfinnur Jacobsen.

Hann leggur afturat, at hava ávísar mannagongdir verið gomul siðvenja í eitt áramál, eru tær galdandi, sama um tær eru skrivaðar í sáttmála ella ikki.

Eyðfinnur Jacobsen sigur, at í hesum føri sær út til, at tað hevur verið ein óskrivað avtala ímillum Tórshavnar Býráð og starvsfólki, at tey hava havt rætt til at fara til lækna, tannlækna og at fylgja líki, uttan at vera drigin í løn.

– Ein slík avtala, sum hevur verið galdandi, er líka nógv í gildi fyri tað um hon ikki er skrivað niður, sigur Eyðfinnur Jacobsen.

– Ein avtala kann saktans verða órskrivað, leggur hann afturat.

Hann sigur, at í hesum føri sær út til, at Tórshavnar býráð er i ferð við at draga vunnin rættindi hjá starvsfólkinum innaftur.

– Men Tórshavnar Býráð kann ikki einvíst broyta avtalur við starvsfólkið.

– Kunnu starvsfólkini prógva, at ávísar mannagongdir hava verið galdandi í áravís, ber ikki til hjá Tórshavnar Býráðið at broyta avtalurnar av sínum eintingum, sigur Eyðfinnur Jacobsen.

## Brot á starvsmannalógina

Páll Nielsen er samdur í, at er talan um gamla siðvenju, kann Býráðið av sínum eintingum ikki draga rættindi hjá starvsfólki inn.

– Er talan um eina siðvenju, hevur tað rættargildi og tað kann vera líka galdandi, sum sjálvur sáttmálin. Og er talan um eina siðvenju, sum hevur fingið sáttmálagildi, kann hendan siðvenja bara broytast í sambandi við sáttmálasamráðingar.

– Er talan um siðvenju, sum hevur verið galdandi í nógv ár, er nógv sum talar fyri, at hon hevur fingið sáttmálagildi.

Tí ber tað ikki til hjá Tórshavnar Býráð av sínum eintingum at broyta siðvenjuna.

Men hann heldur, at tað kann eisini væl vera, at hetta, sum býráðið nú hevur gjørt, eisini er beinleiðis í stríð við lógina um starvsmenn.

Eftir lógini um starvsmenn er sjúka lóglig frávera.

– Útgangsstøðið er, at tað kemur eisini undir sjúku at vera til eina heilsukanning ella viðgerð.

– Kennir eitt starvsfólk seg so illa, at tey eru noydd at fara til lækna, vildi eg í útgangsstøðinum mett, at talan er um sjúku, har starvsfólki hevur rætt at vera frá arbeiði, uttan at vera drigið í løn.

Talan kann í hesum føri eisini vera um eftirlitskanningar hjá lækna, sigur Páll Nielsen.

# Kann gerast eitt tvíeggjað svørð hjá Býráðnum í Havn

**Pedagogfelagið fer ikki at lata framferðina hjá Tórshavnar býráði fara aftur við borðinum**

STARVSFÓLKAPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Hetta kann gerast eitt tvíeggjað svørð hjá Tórshavnar Býráðið.

Carita Bjørklund, forkvinna í pedagogfelagnum, sigur, at tað skal ikki sleppa at fara afturvið borðinum, at Tórshavnar Býráð nú av sínum eintingum hevur sett reglar í gildi fyri, nær starvsfólkið kann fara fara til lækna, tannlækna og at fylgja líki í arbeiðstíðini, uttan at vera drigin í løn.

– Tað einasta býráðið fer burturúr hesum, er, at nú fara starvsfólk bara at leggja seg sjúk í heilar dagar, tá ið tey skulu til lækna ella tannlækna, tí ongin fer at offra nakrar tímalønir upp á tað.

Men eru fólkini sjúk, hava tey rætt til løn.

Hon sigur, at tey hava spurt seg fyri á fleiri stovnum undir Býráðnum, men ongin hevur havt trupulleikar av at starvsfólk eru sloppin ymisk privat ørindi í arbeiðstíðini.

– Tað sigur seg eisini sjálvt, at ongin fer til lækna og ongin fær tannapínu, bara fyri at arga Tórshavnar Býráð, leggur hon afturat.

Forkvinnan í pedagogfelagnum heldur at tað er óskiljandi, at býráðið tekur eitt tílíkt stig av sínum eintingum, uttan at tosa við starvsfólkið um tað.

Hon sigur, at tað hevur altíð verið siðvenja, at starvsfólk hjá býráðnum hava kunnað farið til lækna ella tannlækna og at fylgja, uttan at vera drigin í løn.

– Tí er tað avgjørt ein samráðingarspurningur, skal hendan siðvenjan broytast.

Men Carita Bjørklund leggur afturat, at pedagogfelagið hevur júst verið til samráðingar við Tórshavnar Býráð. Men tá var ikki grett eitt orð um, at privat ørindi hjá starvsfólki var ein trupulleiki.

Hon leggur afturat, at ongin hevur nakað ímóti greiðum mannagongdum.

– Men tað ber ikki til, at býráðið broytir gamla siðvenju av sínum eintingum,.

Hon sigur, at felagið fer nú at taka málið upp og so fær býráðið eitt svar. Men av tí, at málið ikki er viðgjørt enn, vil hon onki siga um, hvat svarið verður.

Pedagogfelagið hevur einar 300 limir í starvi hjá Tórshavnar Býráðið.



# Mær dámar væl at hjálpa

**Gertrud Váðklett fekk annað blómutyssið frá sjónvarpslæknanum. Ikki færri enn tíggju uppskot komu inn um, at hon skuldi fáa blómutyssið. Sjálv var hon púra bilsin av heiðrinum**

BLÓMUTYSSI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Gertrud Váðklett fær her blómutyssið og kekkin handað frá Peter Qvortrup Geisling*

**Viðareiði:** Tá sjónvarpslæknin var liðugur við sín fyrilestur, var stundin komin til at handa blómutyssið. Hann byrjaði at lesa grundgevingarnar upp.

– Tað er ein kvinna, sum vit hava fingið ótrúliga nógv uppskot um. Hon er altíð tilreiðar við eini hjálpandi hond, har tað stendur á og tørvur er á stuðuli og hjálp. Tá deyðsføll hava verið orsakað av sjúku ella vanlukku hevur hon verið ein hollur stuðul hjá teimum avvarðandi upp á allar mátar. Við einum alt ov lágum blóðprosenti fer hon upp úr songini fyri at hjálpa, tá vit onnur høvdu verið verandi seingjarliggjandi. Ein fantastisk kvinna, og ongin er sum hon, segði sjónvarpslæknin millum annað, tá hann las grundgevingarnar fyri, hví hon skuldi fáa blómutyssið.

Heldur aftarlaga í salinum sat ein blóðreyð Gertrud Váðklett, tá læknin segði hennara navn og bað hana koma upp at taka ímóti blómutyssinum.

## Hjálpir avvarðandi

Gertrud sjálv visti ikki av nøkrum, tá hennara navn varð rópt. Men ábendingarnar gjørdu skjótt sítt til, at hon visti, at tað var hon.

– Serliga tá hann nevndi blóðprosentið, tá byrjaði eg at blíva eitt sindur heit, sigur Gertrud, sum er sera fegin um blómutyssið.

Hetta verður eitt av teimum heilt serligu blómutyssunum hjá henni, tí tað er enn ein staðfesting um, at tað, sum hon roynir at gera, verður virt.

– Mær dámar væl at hjálpa. Sjálv arbeiði eg ikki, so eg royni at gera mítt á onkran annan hátt, sigur Gertrud.

Millum annað fylgdi Gertrud sjúku vinkonu sínari gjøgnum alla sjúkraleguna, frá at sjúkan varð staðfest til hon andaði út fyri seinastu ferð. Eisini hevur hon hjálpt fleiri øðrum, har sjúka ella deyði hevur ávirkað familjuna.

– At hjálpa hevur so sanniliga eisini givið mær nakað gott. Eg havi sjálv lært nógv av tí, sigur Gertrud Váðklett, sum sunnukvøldið kundi fara heim við einum blómutyssi, sum tíggju fólk høvdu skotið hana upp til at fáa og einum kekki á 2.000 krónur frá Norðoya Sparikassa.

# Eg eri so glað

**Tað var ein avbera glað og rørd forkvinna í Alzheimerfelagnum, sum tók í móti blómutyssinum frá sjónvarpslæknanum í Norðurlandahúsinum leygardagin**

BLÓMUTYSSIÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

*Sigrun Morh, forkvinna í Alzsheimerfelagnum fekk blómutyssið frá sjónvarpslæknanum leygardagin. Tað vóru sera nógv, sum skutu hana upp*

*Mynd: Jens K. Vang*



– Tann, sum fær blómutyssið í dag, er ein kvinna, sum hevur gjørt eitt stórt arbeiði innan fyri demenssjúkur. Hon hevur tikið alt á sín egnan rygg og verið ein slóbrótari í og við at tað í dag eru 20 demenskoordinatar í Føroyum. Hon tók stig til at stovna Alzheimerfelagið og er ein íbirtari. Vit hava fingið nógvar áheitanir um at lata Sigrun Mohr, forkvinnu í Alzheimerfelagnum fáa blómutyssið í dag, segði sjónvarpslæknin í Norðurlandahúsinum.

Sigrun Mohr tók stig til at stovna Alzheimerfelagið fyri tveimum árum síðani. Hon hevur somuleiðis gjørt eitt stórt arbeiði innan hetta sjúkraøkið. Millum annað hetta gjørdi, at fleiri sendu inn uppskot um, at hon átti at fáa blómutyssið frá læknanum.

## Ikki bara eg

Sigrun Mohr visti sjálvandi heldur ikki av nøkrum. Hon og maðurin skuldu upprunaliga til Funnings í vikuskiftinum, so hon hevði ikki ætlað sær niðan í Norðurlandahúsið leygardagin.

– Eg skilti ikki mannin, tí honum dámar so væl at fara til Funnings, men hann kom við øllum møguligum undanførslum, so tað undraði meg. Men tað vardi meg ikki, at hatta var orsøkin, sigur ein glað Sigrun Mohr.

Ein grannakona segði henni, at hon hevði fríbillettir til tiltakið og lokkaði Sigrun við. Tá so sjónvarpslæknin byrjaði at lesa grundgevingarnar fyri blómutyssinum, skilti Sigrun alt.

– Eg bleiv glað og rørd, og eg visti ikki, hvat eg skuldi siga, greiðir hon frá. Somuleiðis fegnast Sigrun um, at felagið fekk ein kekk áljóðandi 5.000 krónur frá Norðoya Sparikassa.

– Eg tók gott nokk stig til at stovna felagið, men vit eru ein góð nevnd, og tað eru mong onnur, sum eisini gera eitt stórt arbeiði. Ongin ger nakað einsamallur, so tað eri eg avbera fegin um, sigur Sigrun.

Hon sigur eisini, at hetta er eitt av teimum heilt serligu blómutyssunum, sum hon nakrantíð hevur fingið. Og samstundis verður ljós varpað á felagið.

# Undirhald fyri allar pengarnar

**Vælupplagdur og undirhaldandi helt danski sjónvarpslæknin Peter Qvortrup Geisling fleiri fyrilestrar um vikuskiftið. Teir báðir almennu fyrilestrarnir vóru í Norðurlandahúsinum leygardagin og á hotel Norð á Viðareiði sunnukvøldið**

LÆKNIN HEVUR ORÐIÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Viðareiði:** Klokkan var ikki farin langt av sjey sunnukvøldið, tá Jógvan Eliasen bjóðaði teimum um 200 áhoyrunum á hotellinum vælkomnum. Síðani fekk læknin orðið, og tað livdi hann væl upp til. Í samfull fimm korter út í eitt tosaði Peter Qvortrup Geisling um, hvussu sendingin verður gjørd, hvat sømir seg at vísa í eini slíkari sending, las nøkur brøv upp og skemtaði óføra nógv. Ikki einaferð steðgaði hann á fyri at fáa sær ein vatnsopa.

Láturmusklarnir fingu nógva venjing hesa løtuna, tí hóast læknin tosaðu um ymsar sjúkur, so gjørdi hann tað á ein léttan og skemtiligan hátt, at fólk fingu undirhald við.

Øll vóru á einum máli um aftaná, at sjónvarpslæknin dugdi avbera væl, og at tað hevði verið áhugavert at lurta eftir honum.

## Vælnøgdir

Teir báðir fyrireikararnir, Jógvan Eliasen og Niclas Heri Jákupsson, eru avbera vælnøgdir við undirtøkuna, sum vitjanin hjá danska sjónvarpslæknanum hevur fingið.

– Tilsamans hevur hann hildið fyrilestrar fyri oman fyri 1.000 fólkum, so tað er ikki at forsmáa, siga teir.

Tíðarætlanin fyri vitjanini hevði ikki nógv hol. Alt var lagt tilrættis, og læknin hevur havt úr at gera um vikuskiftið. Hann vitjaði roykiátakið hjá Klaksvíkar kommunu fríggjadagin, har 300 næmingar vóru tilstaðar, hann vitjaði Landssjúkrahúsið, har 250 fólk lurtaðu eftir honum, og 400 fólk vóru í Norðurlandahúsinum leygardagin. Sunnudagin vitjaði hann á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og um kvøldið var hann so á hotel Norð. Hann var somuleiðis á vitjan hjá Archibald Black listarmanni í Klaksvík.

Læknin sjálvur letur avbera væl at vitjanini. Hann sigur, at alt var væltilrættislagt, og heldur hann, at hann til eina aðru ferð fer at hava tað lættari at koma til Føroyar, tí nú hevur fingið nakað av vitan um landið.

Læknin hevur ætlanir um at gera tvær sendingar úr Føroyum einaferð í summar, og tá hevur hann somuleiðis ætlanir um at halda feriu í Føroyum í eina viku, tá upptøkurnar til sendingarnar eru lidnar.

– Eg havi fingið ein lítlan smakk av tykkara landi, og mær dámar avbera væl hesar hvítu oyggjarnar, og eg ivist ikki í, at mær fer at dáma tær minst líka væl grønar, sigur sjónvarpslæknin, sum fór av aftur landinum tíðliga mánamorgunin.



*Peter Qvortrup Geisling fyri fullum sali á hotel Norð á Viðareiði sunnukvøldið. Tiltakið var líka væleydnað í Norðurlandahúsinum leygardagin*